# kstrarparadís hjá fiski




*- Tað er týðiligt, at tað eru tey fiskasløgini, sum liva uppi á sjálvum Bankanum, sum hava tann besta vøksturin. Djúpari, vit fara, tess seinni veksur fiskurin, segði Eyðfinn Magnussen, biologur, sum hevur gjørt kanningar á Føroyabanka síðan 1992*

líknandi sløgum aðrastaðni, meðan tey ferðandi fiskasløgini ikki vaksa øðrvísi.

- Og tað var júst hetta, sum kanningin vísti. Tey fastbúgvandi fiskasløgini á Bankanum veksa í miðal 27% skjótari enn aðrastaðni, meðan vøksturin hjá teimum ferðandi sløgunum er á sama støði sum aðrastaðni, segði Eyðfinn Magnussen.

## Dýpið avgerandi

Vøksturin er tó tengdur at dýpinum, har fiskurin livir.

- Tað er týðiligt, at tað eru tey fiskasløgini, sum liva uppi á sjálvum Bankanum, sum hava tann besta vøksturin. Djúpari, vit fara, tess seinni veksur fiskurin. Eyðfinn helt, at orsøkin til hetta ivaleyst er, at á størri dýpi gerst sjógvurin kaldari, og at vit tá heldur ikki longur eru á sjálvum Bankanum.

- Sjálvur Føroyabanki strekkir seg út á umleið 200 m. dýpi. Kanningar hava eisini víst, at tað serliga er her, at sjógvurin er støðufastur og melur í klingur.

## Tunga og knurrhani

Eyðfinn vísti á, at tað er eisini á tí grunna partinum av Bankanum, at vit finna nógva nebbasild og høgguslokk. Hesi eru høvuðsføðin hjá toski og hinum størru fiskasløgunum, sum halda til har og eiga ivaleyst ein stóran part av heiðrinum fyri góða vøkstrinum, ið vit finna hjá fiskasløgunum, sum halda til í hesum økinum. Nebbasild og høgguslokkur eru tó ov stór at eta hjá tungu og knurrhana. Hesi bæði fiskasløgini liva vanliga av bustmaðkum og smáum krabbadýrum, og teimum er ikki so nógv til av á Bankanum.

- Hetta er helst orsøkin til, at vøksturin hjá tungu og knurrhana ikki skarar framúr á Føroyabanka, segði hann.

Í áhugaverda fyrilestrinum vísti Eyðfinn á, at tá ið vit vita, at tað serliga er føði og hiti, sum stýra vøkstrinum hjá fiski, eru tað helst eisini hesi viðurskifti, sum eiga ein stóran part av heiðrinum fyri góða vøkstrinum á Føroyabanka.




**Relativ longd (%) í mun til dýpi (m)**
Tað eru serliga hjá teimum fiskasløgum, sum liva á tí grunna partinum á Føroyabanka, at vøksturin skarar framúr. Niðanfyri 200 m er vøksturin knapt so góður.



*- Tað hevur leingi verið kent, at toskurin á Føroyabanka veksur óføra skjótt – ja, so skjótt, at hann telist millum skjótast vaksandi toskasløgini í heiminum, segði Eyðfinn Magnussen*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*




...aðni, meðan tey sløgini, sum
...skasløgum aðrastaðni.